# Landslagið og býurin

**Landslagið er eisini eitt tilfeingi – eitt avmarkað tilfeingi. Men duga vit nóg væl at síggja, skilja og umsita okkara avmarkaða landslag og byggilendi? Hóast fíggjarliga støðan ídag ikki er so góð í okkara lítla landi, koma vit heilt skjótt í ta støðu, at eftirspurningurin eftir byggilendi aftur gerst stórur**

ARKITEKTURUR
*Ove Mortensen*



*Avfall frá útgrevstri – lagt út í hagan. Umskildningarnir eru fleiri um hvussu hetta er komið ílag*

## Spara orku og verja umhvørvi

Bæði vinnulívið og sethúsabyggjarar fara at leggja kommununnar undir trýst fyri at útvega sær nýtt attraktivt byggilendi. Sum frá líður gerast bygdir og býir gerast alt størri og spjaða seg longur og longur út um tey gomlu bygdar- og býarmørkini.

Nýggir vegir skulu gerast til hesi øki. Nýggjar kloakkog vatnleiðingar skulu leggjast og el-netið má útbyggjast.

Eisini skal havast í huga, at innheinting av ruski, kavarudding av vegum og viðlíkahald av almennum økjum og vegum eisini er partur av tí at taka nýtt lendi til byggiøki.

Alt hetta er sera kostnaðarmikið – bæði íløga og rakstur. Og í onkrum føri er tað kanska heldur ikki neyðugt?

Verður bygt tætt, krevjast minni av tekniskum leiðingum í jørð, færri vegir skulu gerast og tað hevur so aftur við sær, at minni orka krevst, bæði fyri at fáa alt hetta gjørt og til kavarudding og viðlíkahald.

Samstundis er væntandi, at tess styttri frástøða, tess færri bilar verða í býnum, tí fólk fara í størri mun at klára seg við kollektivavu ferðsluna.

Og tað hevur positiv árin á umhvørvið.

Tað merkir í stuttum, at kunnu vit so eisini integrerað alt hetta í arkitekturin, er nógv vunnið.

Verður hugsað um útlát og orkusparandi tiltøk, ja, so er tað ikki gongda leiðin í einum framtíðar samfelagi at breiða seg um eitt stórt lendi. Einaferð verður eitt hámark rokkið og tað verður neyðugt at víðka býin.

Men hví fara út í hagan eftir byggilendi heldur enn at byggja afturat býarkjarnuni?

Spakiliga, og uttan at ein varnast tað, verður týdningarmikið landslag lagt undir heilt. Í fleiri førum sæst hetta aftur í bygging, ið ikki altíð er nóg væl umhugsað, men heldur eru merktar av, at trýst hevur verið lagt á tey, sum varða av planlegging og tilfeingi okkara.

## Seta krøv til útstykkingar

Av lyndi eru vit menniskju egoistisk og tráðanin eftir at eiga og leggja jørð undir seg, situr djúpt.

Men eiga vit ikki at seta stór estetisk- og arkitektonisk krøv til tey, ið vinna sær jørð til byggilendi og eiga vit ikki eisini at tryggja at atlitini at umhvørvinum og krøvini um estetik ikki mugu dvína fyri reindyrkaðari spekulatión?

Eiga vit ikki eisini at seta spurnartekin við, um vit framhaldandi skulu taka nýtt lendi til byggiøki, áðrenn vit hava kannað møguleikarnar fyri at byggja tættari í verandi býi - heldur enn at breiða seg út og taka burtur av avmarkaða tilfeinginum?

Framhaldandi neyðtøka og dálking av landslagnum í sambandi við nýggjar útstykkingar eru týðiligar, hóast roynt verður at billa fólki nakað annað inn. Vakur hagi og hamrar verða sprongdir burtur fyri at vinna nakrar fermetar at byggja á. Í onkrum føri verður avfallið frá hesum útstykkingum spjatt út um tað bygda økið og sæst aftur sum dálking í landslagnum. Hóast ábøtur kunnu verða gjørd á hesi sár í landslagnum og plantað kann vera í avfallið frá útstykkingunum, er upprunaliga náttúran í slíkum føri oyðiløgd.

## Skráseta og tryggja virði

Øll hava vit eina ábyrgd av tilfeingi okkara og mugu ikki fara um tað við skilaloysi, hóast neyðugt er at útvega nýtt byggilendi. Vit mugu duga betur at skráseta og tryggja virðini í landslagum. Uttan skilagóða heildarætlan og dugnaligt fólk, ið megna at standa ímóti trýsti, er vandi fyri, at uppaftur meiri týdningarmikið tilfeingi ferð fyri skeytið.

Halda vit fram at taka av tilfeingi okkara, sum higartil, og halda vit fram at byggja eftir sama leisti sum nú og spjaða býin, kunnu vit gloyma alt um ein komandi vælskipaðan *grønan bý*.



*Spreingja hamara burtur heldur enn at planleggja eftir landslagnum*

## Neyðugt við hugburðbsroyting

Verður býur alsamt breiddur út, fær tað avleiðingar fyri landslag og umhvørvi, eins og tað longu hevur fingið.

Í dag er høvuðsstaður okkara spjaddur út á fleiri býlingar heldur enn at gera ein tættan skipaðan bý. Eg vildi sagt, at høvuðstaður okkara er ein *sethúsabýur*. Nú er ikki vist, um fjøldin vil búgva í býlingum ella býnum, men skulu vit hava nakað, ið líkist einum býi, ja, so er eisini neyðugt við stórari hugburðsbroyting.

Sum er, verður nógv orka nýtt til at binda býlingarnar saman, men nógv kundi verðið spart við at bygt tættari í býarkjarnuni og víðari út frá hesi kjarnu. Eisini er hesin byggihátturin -at byggja tætt- við til at avmarka ovurnýtsluna av tilfeingi okkara.

Meiri lív og dynamikkur er í býarumhvørvi, har fólk búgva tætt. Sum støðan er nú, er tað smáligt við býarrúmi, men vit kenna væl til, hvussu eitt tættbygt, umhvørvisvinarligt og attraktivt býarrúm við estetiskum virðum, dregur fólk til sín og er við til at skap lív húsanna millum.

## Hevði ikki gjørt býin verri

Dagliga hoyra vit í fjølmiðlunum um grøn- og orkusparandi tiltøk, útlát, veðurlagsgass, dálking, bjálvingarstuðul, grøna el-framleiðslu og landsbyggireglugerð.

Við atliti at øllum hesum, slepst ikki undan at gera nýggjar lokalplanir. Í hesum sambandi kundu vit byrja við at:

*· kritiskt kanna eftir og staðfesta um øki eru í verandi býi, ið hava dygd og grundarlag fyri framhaldandi útbygging og sum sostatt kunnu gerast partur av framtíðar planlegging.*

*· gera upp við okkum sjálvi, hvat slag av bygging, vit vilja hava, sum kann gerast partur av framtíðar planlegging, og hvussu tætt byggjast kann.*

*· kannað eftir um hús og øki eru – ella partar av hesum - ið eiga at friðast.*

*· styrkja og betra um týdningarmiklu funktiónirnar í býnum og framhaldandi útbyggja hesar, samstundis sum arbeitt verður við at binda býlingarnar betur saman við miðbýin.*

*· planleggja eitt fjølbroytt og attraktivt íbúartilboð í teimum økjum, ið eru ætlað og egnað til at byggja tætt.*

*· planleggja soleiðis, at íløgurnar gerast lønandi og ein fyrimynd bæði sosialt og umhvørvisliga.*

Eiga vit ikki at royna hetta? Slík tilgongd krevur vilja, dugnaskap og dirvi, og hevði eftir mínum tykki ikki gjørt býin verri.